# Nú er álvara

*Bæði í kvøld og annaðkvøld verða tvær fjórðingsfinalur at síggja á sjónvarpsskýggjanum. Vit hava mett eitt sindur at einstøku dystunum*



JÁKUP MØRK

Bólkaspælið í EM-endaspælinum er nú farið aftur um bak, og meðan helmingurin av liðunum hava stungið í sekkin, gera hini átta seg til reiðar til týdningarmiklu fjórðingsfinalurnar.

Komandi europameistararin kann ikki longur loyva sær at snáva eina einastu ferð, og tí eru hesir dystir ofta merktir av, at leikararnir eru dekan ov fjáltursstungnir.

Vónandi verður tó talan um fýra áhugaverdar dystir, har tað verður besta álopið heldur enn sterkasta verjan, sum verður avgerandi fyri, hvørji lið vinna seg fram til hálvfinalurnar.

### Týskir portugisar

Fyrsta av teimum fýra fjórðingsfinalunum verður millum Portugal og Turkaland.

Uttan at himprast við, kunnu vit helst staðfesta, at Portugal er stórfavorittur at vinna dystin. Í bólkaspælinum fingu teir fult stigatal, og hátturin hetta varð gjørt uppá, boðar frá, at ein broyting er um at koma í portugisuskum fótbólti.

Ofta hevur nevnliga verið tikið til, at portugisar hav verið ov bleytir, tá tað ráddi um týdningarmiklar dystir, men júst tað øvugta hendi í bólkaspælinum.

Móti Onglandi fingu teir vent 0-2 til 3-2, og í dystinum móti Rumenia, hildu teir alla tíðina á fram at trýsta, og eftir 94 minuttir gav hetta eisini úrslit.

Talan hevur sostatt nærum verið um týsk fyribrigdi á portugisiska liðnum, og fyri at undirstrika hetta, varð Týskland í seinasta dystinum hølvað ígjøgnum av eykamonnunum hjá Portugal.

Turkaland hevur fyri fyrstu ferð ogna sær stig í einum endaspæli, og mangt bendir eisini á, at teir skulu sláa seg tols við hesum.

Turkisku leikararnir hava snøgt sagt ikki sama klassa, sum teir hjá portugal, og eisini má tað metast ivasamt, um teir hava neyðuga støðufesti í verjuni til at halda leikarum sum Figo og Joao Pinto frá fatinum.

### Gáva til Hagi

Dysturin millum Italia og Rumenia, sum verður tann seinni leygarkvøldið, kann tykjast ógvuliga torførur at spáa um.

Italska landsliðið tykist í løtuni at vera væl betri fyri, enn teir hava verið í nógv ár. Í verjupartinum standa teir seg eins væl, og teir altíð hava gjørt, men í álopspartinum hevur verið nógv meira flog yvir spælinum, enn tað, við vanliga seta í samband við italskan fótbólt.

Hartil hevur italski landsliðsvenjarin tann positiva trupulleika, at hann helst má velja millum Totti ella Del Piero til annan av álopssessunum. Kanska eitt trupult val, men hinvegin ger hetta eisini, at ábyrgdin fyri italska álopsspælinum ikki bert hvílir á einum persóni, tí hevur hesin ein ringan dag, kann ein fult so góður leikari setast inn ístaðin.

Rumensku møguleikarnir kunnu tykjast smáir, men kortini skulu teir so avgjørt ikki avskrivast. Talan er um sera royndar leikarar á flestu plássum, og ikki minst kann tað hava stóra sálarliga ávirkan, at talan kann verða um seinasta dystin hjá Hagi á landsliðnum.

Bóltsnillingurin hevur í fleiri ár verið partur av evnaríkum rumenskum liðum, men tað hevur ongantíð eydnast honum at verið við at vinna nakað heiðursmerki á landsliðnum.

Liðfelagar hansara góvu honum eina gávu, tá teir, uttan leikbannaða liðskiparan, vunnu seg fram til fjórðingsfinalurnar, og møguliga megna teir enn einaferð at stríða seg til sigurs.

### Trýst á hollendingum

Á pappírinum tykist mest áhugaverda uppgerðin at standa millum vertirnir úr Hollandi og Jugoslavia.

Skal talan gerast um ein minniligan dyst fyri hyggjaran, er tó neyðugt, at jugoslavarnir vísa seg frá síni bestu síðu, soleðis sum teir gjørdu seinasta partin av dystinum móti Slovenia, ella fyrra partin av dystinum móti Spania. Móti Noreg var í øllum førum ikki talan um tann positiva fótbólt, sum vit vanliga seta jugoslavar í samband við.

Mótstøða teirra verður tó sera hørð, tí skal metast eftir leikarunum, er hollendski landsliðshjópurin so avgjørt millum teir sterkastu í Europa. Spurningurin tykist tó vera, um tað endiliga eydnaðist at fáa ferð á fótbóltsmaskinuna í dystinum móti Fraklandi, ella um hollendski sigurin bert var grundaður á ta sannroynd, at Frakland spardi stóran part av stuðulsleikarunum.

At hollendsku leikararnir megna at gera mál móti jugoslavia, man lítil ivi vera um. Spurningurin tykist hinvegin vera, um hollendska liðið megnar at halda jugoslavunum og serliga Savo Milosevic frá egnum máli.

Fyrimunurin av heimavøllinum kann vísa seg at verða avgerandi fyri dystin, men hetta er samstundis við til at leggja eitt øgiligt trýst á hollendsku leikararnar. Megna teir at liva upp til hetta?

### Endurtøka frá ’84

Seinasta fjórðingsfinalan verður millum Spania og Frakland. Talan er um eina endurtøku av finaludystinum frá 1984, og tað tykist ikki ósannlíkt, at talan eisini verður um endurtøku av úrslitinum frá teirri uppgerðini.

Frakland hevur í dystunum í bólkaspælinum sýnt eina ræðandi styrki, og hóast ósigurin móti Hollandi, verða teir av mongum mettir sum mest sannlíka boðið upp á ein komandi europameistara. Hagtølini eru tó ikki við fraklendingum, tí enn hevur tað ongantíð eydnast einum verandi heimsmeistara at vinna EM-heitið.

Spanska liðið hevur ofta havt tað trupult, tá talan er um endaspøl, hóast teir seinnu árini altíð hava verið roknaðir milum favorittarnar.

Í Fraklandi fyri tveimum árum síðani noyddust teir at siga farvæl eftir bólkaspælið, og bert ein ótrúligur endaspurtur í seinasta dystinum móti Jugoslavia forðaði fyri, at teir fingu somu lagnu hesafarð.

Møguliga var sigurin á Jugoslavia júst tað, sum skuldi til fyri at tendra sponsku leikararnar, soleiðis at teir nú veruliga vinda seg upp.

Hetta verður eisini neyðugt, um Spania skal vinna á Fraklandi. Tað var ikki av tilvild, at landið vann heimsmeistaraheitið fyri tveimum árum síðani, og liðið tykist ikki vera vikna síðani hendan sigurin. Heldur tvørtur ímóti.

# Seinasta útkall hjá B36

*Fyri fyrstu ferð í ár er líkt til, at Johann Nielsen hevur allar leikarar tøkar*

Jákup Mørk

Fyrsta partin av kappingarárinum var líkt til, at B36 skuldi verða fullkomuliga einaráðandi í spurninginum um komandi føroyameistaran.

Eftir fimta sigurin á rað, kom tó brádliga stígur í, og síðani hetta hevur árstalsfelagið bert vunnið ein dyst, meðan tríggir eru taptir.

### Mugu hanga í

Laka úrtøkan seinastu vikurnar hevur havt við sær, at grannarnir úr HB nú eru farnir fimm stig framum, men við sigri í sarpigerði sunnudagin, kann B36 minka hendan munin niður aftur í tvey stig.

Verður dysturin taptur, kann støðan eftir vikuskiftið verða tann, at árstalsfelagið dettur aftur á fimta plássið í landskappingini.

Ein av orsøkunum til, at úrtøkan hjá B36 hevur verið so løk, er helst, at óvanliga nógvir skaðar hava verið í hópinum, men nú er tó líkt til, at ein glotti er at hóma hesum viðvíkjandi.

Bjarni Prior, sum er plágaður av skaða í lærkrikanum, hevur longu fingið summarfrí, men hinvegin verður roknað við, at bæði Mikkjal Thomassen og Jens Kristian Hansen verða við sunnudagin. Teir báðir hava ikki vant við fullari ferð í vikuni. Tað hevur Egil Zachariasen heldur ikki, men roknað verður við, at teir allir eru tøkir í morgin.

### Allir tøkir

Eins og B36 hevur GÍ eisini verið meint rakt av skaðum hetta kappingarárið. Eitt fyribrigdi, sum hevur viðført, at Johann Nielsen ongantíð hevur havt møguliga at sendu somu ellivu á vøllin tveir dystir á rað.

Fyri fyrstu ferð er tó líkt til, at allir GÍ leikararnir eru til reiðar at fara á vøllin sunnudagin. Soleiðis var støðan í øllum førum, tá vit frættu fyrrapartin í gjár.

GÍ hevur higartil havt eitt heldur vánaligt kappingarár, men í steypakappingini hevur tó gingist betri, og ein sigur móti HB komandi sunnudag kann ivaleyst bjarga nógvum í so máta.

Jóann roknaði tó ikki við, at hetta fór at nerva leikararnar nakað, soleiðis at teir hugsaðu meira um steypafinaluna enn um dystin sunnudagin. – Vit spæla sum vit altíð hava gjørt, var einasta viðmerkingin frá GÍ venjaranum hesum viðvíkjandi.

Hagtølini fyri uppgerðina boðað greitt frá, at talan verður ikki um javnleik.

Seinasta tíggjuáraskeiðið hevur GÍ verið við yvirlutan sjey ferðir, meðan B36 hevur vunnið sær øll stigini tríggjar ferðir.

# Jóansøkan karmur um lokaluppgerð

*Bæði VB og Sumba mugu helst vera týdningarmiklar leikarar fyri uttan, tá tey leygarkvøldið skulu avgreiða seinnu lokaluppgerðina*

JÁKUP MØRK

Tá Sumba í fjør tryggjaði sær framhaldandi tilveru í fremstu deildini, var tað í stóran mun takkað verið teimum seks stigunum, sum teir vunnu frá grannunum úr Vági.

Fyrra uppgerðin millum liðini bæði endaði tó við VB sigri, men árið í fjør vísur týðuliga, at tá talan er um lokaluppgerð, kann ikki roknast við nøkrum sum helst.

### Bíða eftir summarinum

Milan Cimburivic, sum venur sumbingar, sigur við Sosialin, at teir fara at royna at halda fast um stigið, sum teir hava undan dystinum.

Hópurin er tó nakað skerdur undan grannauppgerðini. Undir øllum umstøðum er vist, at hvørki Mortan úr Hørg (leikbannaður) ella Jan Poulsen (burturstaddur) verða við í morgin. Harumframt er ivamál um Eirik Joensen, sum hevur drigist við skaða meginpartin av árinum, eins og umstøðurnar hjá Trygva Nielsen at spæla fótbólt í ikki eru av teimum bestu.

Milan vónar tó, at dysturin í Vági kann kasta okkurt av sær, og so er bara at bíða eftir, at summarið kemur til Sumba.

Tað er nevnliga væntandi, at bæði jugoslaviski Baja, sum í fjør varð toppskjútti hjá Sumba, og Páll Magnar Kjærbæk verða við aftur, tá farið verður undir seinnu kappingarhálvu, og ivaleyst verða hesir báðir sera týdningarmiklir í stríðnum um at sleppa undan niðurflyting.

### Góða jóansøku

Í Vági er tað so undir ongum umstøðum niðurflyting, sum er samrøðuevnið í hesum tíðum.

Higartil hevur gingist sera væl hetta kappingarárið, og vágbingar hava ongar ætlanir um at lata sumbingar oyðileggja sær spælið.

Leikani venjarin, Krzystof Popczynzki, ásannar, at talan kann vera um ein sera strævnan dyst fyri hansara leikarar. – Sumbingar geva seg altíð 150%, tá spælt verður móti VB, og tí mugu vit taka dystin í størsta álvara, sigur póllendingurin.

VB liðið verður helst nakað skert, undan dystinum, tí hvørki Tórður Holm og Jón Pauli Olsen hava vant við fullari ferð hesa vikuna, orsakað av smærri skaðum. Harumframt er Predrag Zivkovic leikbannaður, meðan Janus Kjærbo hinvegin er tøkur aftur.

Jóansøka er, og einki er at ivast í, at nógv fólk verður á Eiðinum, tá dysturin verður floytaður ígongd. Stendur tað til leikararnar, so ætla teir sær at gera sítt til, at talan verður um eina góða jóansøku fyri Vágs bygd, er seinasta viðmerkingin, sum vit fáa frá Krzysstof.




**Toll- og Skattstova Føroya, Stýrið**

## Skrivstovufólk

Vegna barnsburðarfarloyvi er avloysarastarv í umsitingardeildini í Stýrinum leyst at søkja til setan frá 15. august 2000 og 1 ár fram, møguliga longri. Arbeiðstíðin er kl. 8–13.

**Arbeiðsuppgávur**
Talan er um nógvar ymiskar uppgávur, t.d. kunnu hesar nevnast:
- kontering og bóking av rokningum
- umsita klokkuskipanina
- umsita felags innkeyp av skrivstovulutum v.m.

**Førleikakrøv**
Skrivstovuútbúgving er ein fyrimunur. Annars vænta vit okkum at tú hevur hesar førleikar og eginleikar:
- kanst arbeiða sjálvstøðugt
- ert nærløgd/lagdur
- hevur lætt við at samskifta við onnur

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður lønt í 8. ella 9. lønarflokki í sáttmálanum millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálastýrið. Løn og setanarviðurskifti verða ásett eftir sama sáttmála.

**Umsóknir**
Handskrivað umsókn saman við avritum av prógvum og viðmælum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 14. juli 2000.

**Toll- og Skattstova Føroya**
Stýrið
Postboks 2151
FO-165 Argir

Vilt tú frætta nærri um starvið, kanst tú ringja til Birgit Hansen á tlf. 352026.

***Um stovnin***
*Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálastýrinum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll- og avgjaldslógirnar, inntøkuskattalógina v.m. og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum. Stovnurin hevur 145 starvsfólk og er skipaður soleiðis at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Í stýrinum eru fýra deidir: Eftirlitsdeildin, Lógardeildin, Menningardeildin og Umsitingardeildin. Tær 6 økisskrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Tórshavn, Saltangará og Klaksvík røkja raksturin.*

KPMG

## Stjóri til Telefelagið Alnót

Søkt verður eftir stjóra til Telefelagið Alnót at byrja skjótast til ber.

**Felagið**
Alnót er eitt nýstovnað telefelag við tí endamáli at bjóða fram fjarskiftistænastur á høgum støði, bæði til fyritøkur og til privat viðskiftafólk.
Fíggjarligu fortreytirnar fyri hetta arbeiði eru skaptar gjøgnum eitt samarbeiði millum føroyskar og útlendskar fyritøkur og stovnar.

Felagið hevur fingið konsessión frá Vinnumálastýrinum til at reka fjarskiftisvirksemi.

**Arbeiðsuppgávur**
Sum stjóri í felagnum kemur tú:
- saman við nevndini at seta upp framtíðarmálini fyri felagið og at tryggja, at málini verða rokkin
- at leggja rakstur felagsins til rættis, herundir at seta fólk í starv við neyðugum førleika, bæði á tøkniliga og umsitingarliga økinum
- at standa fyri framhaldandi rakstri felagsins

**Førleikakrøv**
Ynskiligt er at tú:
- hevur eina viðkomandi ástøðiliga tøkniliga og/ella fyrisitingarliga útbúgving
- hevur hollar arbeiðsroyndir
- hevur gott fíggjarligt innlit
- er málsøkjandi
- hevur góð samstarvsevni

**Umsóknin**
Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Finnbjørn Zachariasen, cand.merc.aud.

Umsóknin við viðkomandi skjølum skal sendast til KPMG statsaut. revisorar Sp/f skjótast til ber og í seinasta lagi 7. juli 2000.

Allir fyrispurningar og umsóknir verða viðgjørd í trúnaði.

KPMG statsaut. revisorar Sp/f
Postsmoga 3258, FO-110 Tórshavn
Tel 34 34 34 Fax 34 34 35

85 • 31 65 11

**Lesið sosialin -tað loysir seg**

**Sethúsaogn í Skálavík**

Um hóskandi boð fæst, verður ognin matr. nr. 10 b, Skálavík seld. Talan er um grundøki til støddar 1015 $m^2$ við ástandandi eldri sethúsum.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til

**Advokatskrivstovuna**
**Fr. Petersensgøta 9**
Att: Fríða Patursson, adv.

Halgir Winther Poulsen, adv. — Magnus S. Petersen, adv.
Fríða Patursson, adv. — Ólavur Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv. — Niels Winther Poulsen, adv.

**Tlf. 311145**



**Málningaframsýningin á Varmakeldu 2000**

Tey, sum vilja lata verk inn til Málningaframsýningina á Varmakeldu, skulu lata tey inn í Fuglafjarðar skúla mikukvøldið 28. juni kl. 20 til 22.

Saman við verkunum skal vera listi yvir: heiti, tøkni og prís og verkini skulu vera merkt samsvarandi við listan.

Fyrireikararnir tilskila sær rætt at velja ímillum verkini og at skipa framsýningina.

**Fyrireikararnir**

**SUÐUROYINGAR!**

**TEORISKEIÐ**
byrjar
**mánakvøldið 3. juli kl. 19.00**
**í Trongisvágs skúla**

**Koyriskúlin 2000**
v/ Alva Mortensen, Tvøroyri
Tlf. 221199 & 372020

GÖLZ



**Skerimaskinur**
*verða nýttar til:*
- *asfalt og betong*
- *umvæling av vegum*
- *skering í asfalt til útgrevstur*

Leverandørurin til entreprenørar í 28 ár... Tosið við okkum!
**Kaj Andreasen & Co**
Sandvíkarhjalli - Tel. 315600 - Fax 318008

Sosialurin - 311820

**Reyði krossur Føroya**

Sorgarlinjan hjá Reyða Krossi Føroya svarar allar dagar frá kl. $17^{00}$ til $23^{00}$

☎ 212380